Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Skipanin viðvíkjandi undirvísingartímatali skúlans

Galdandi frá 1. august í 2022

1. Ársbýttir skúlar:

Skúlar, ið hava 115 næmingar og fleiri, eru 7 flokkaðir og ársbýttir.
Vanlig floksstødd er sett til 24 næmingar. Tó verða ikki latnir tímar til nýggjan flokk, fyrr enn flokkurin fer upp um 26 næmingar, men eykatímar verða givnir soleiðis:

Minsta tímatal og eykatímar:

Flokkur	Minsta tímatal	Eykatímar 24 < x <27
1.	24	sí tvílæraraskipan
2.	26	sí tvílæraraskipan
3.	28	5
4.	30	5
5.	31	5
6.	31	5
7.	33	5
8.	37	
9.	37	
10.	30*	

Ein undirvísingartími hjá skúlanæmingum er 45 min.
* Tímatalið til smáar 10. flokkar er tó 20 undirvísingartímar um vikuna

a. *Tvílæraraskipan í 1.- og 2. flokki:*

Næmingatal	**Tímatal 1.flokkur**	**Tímatal 2.flokkur**
18	29	29
19	30	30
20	32	32
21	34	34
22	35	35
23	37	37
24	38	38
25	40	40
26	42	42

Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

b. *Miðfirrað serundirvísing:*
Miðfirraða tímajáttanin er ætlað til serundirvísing og onnur serundirvísingarlig átøk, sum t.d. lesiskeið, økta tvílæraraskipan, serligar undirvísingarligar tilgongdir osfr. Tímar til miðfirraða serundirvísing eiga bert at nýtast til sernámsfrøðilig átøk. Hesir tímar skulu nýtast til stuðul og eykahjálp í einstøkum lærugreinum til næmingar ella næmingabólkar, sum hava ilt við at fylgja við vanligu undirvísingini í lærugreinini. Miðfirraða serundirvísingin eigur at verða ráðløgd saman við Førleikastovuni og við ráðgeving frá Sernámi. Játtanin til miðfirraða serundirvísing er 24% av næmingatali skúlans.

c. *Handaverk og list:*
Í handaverki og list verður roknað við eini miðal bólkastødd, sum er tólv næmingar. Fimm tímar verða roknaðir til hvønn bólkin frá 3. til 7. flokk, tó sum desimaltal fyri hvønn árgangin. Síðani verður talt saman og rundað til heilt tímatal fyri allan skúlan.

2. <u>5- og 6 flokkaðir skúlar:</u> <u>(skúlar við 69 – 114 næmingum)</u>
Tímarnir til yngstu árgangirnar verða drignir frá. Skúlin ræður sjálvur fyri, hvørjir flokkar verða lagdir saman í skúlaárinum.

b. Miðfirrað serundirvísing - sí pkt. 1 b.

c. Reguleringsfaktor til 5 flokkaðar skúlar er 6% av næmingatali skúlans.

3. <u>Skúlar, sum hava færri enn 69 næmingar</u>
Skúlar, sum hava færri enn 69 næmingar, tað vil siga 4. flokkaðir og niðureftir, men hava næmingar í øllum 7 árgangunum, verða roknaðir við støði í minimum tímatali sambært lógini. Tað vil siga minimum tímatal + glíðandi yvirgongd fyri hækkandi næmingatal + 30% reguleringsfaktor. Formilin sær soleiðis út fyri t.d. ein skúla við 55 næmingum: *<u>Minimum sambært lóg + (munur á tímum upp til</u> <u>næsta bólk/mun á næmingum upp til næsta bólk)*(næmingatal – lægsta</u> <u>næmingatal í bólkinum)+ næmingatal*0,30, og gevur (105+(20/19)*(55/49)+(55*0,30)=128)</u>*. Fyri skúlar, ið ikki hava næmingar í øllum 7 árgangum, verður serstøk tímatillutan gjørd.

4. <u>Skúlar, ið hava færri enn 15 næmingar</u>
Tímatillutanin til hesar skúlar er gjørd við støði í viðurskiftunum á hvørjum einstøkum skúla.

Undirvísingarstýrið
4/5-2022